Tórshavn,

Journalnr.

# Avtala um veiting av vegsalti

Hendan avtala viðv. Veiting av vegsalti er gjørd ímillum

Navn fyritøka

Adressa

Bygd/ Býur

(herundir kallað ”Seljari”)

og

Landsverk

Tinghúsvegur 5

Postboks 78

110 Tórshavn

(herundir kallað ”Keypari”)

## 1 Allýsingar

1.1 Í avtaluni hava hesi orð hendan týdningin, tá ið tey verða skrivað við Stórum byrjunarstavi: ”Avtalan” merkir hendan avtalan um veiting av salti, íroknað skjal ? sum møguligani verður broytt frá tíð til aðra sambært avtaluni petti 12.1.

”Partur” ella ”Partar” merkir Seljari ella Keypari hvør sær ella Seljari og Keypari saman.

”Vøra” merkir salt, sum verður selt av Seljara og Keypt av Keypara sambært hesi Avtalu, og sum er lýst nágreiniliga í skjali ?.

## 2 Hvat fevnir avtalan um

2.1 Seljari hevur við hesi avtalu skyldu til at selja og veita, og Keyparin hevur við hesi avtalu skyldu til at keypa og taka ímóti vøruni sambært teim treytum, sum Avtalan tilskilar.

2.2 Møguligar treytir í skjølum hjá einum parti, sum stríðir ímóti Avtaluni, eru ikki bindandi, uttan so at tað er avtalað skrivligt millum partanar.

2.2 Keyparin hevur skyldu til at keypa eina minstanøgd uppá 1500 tons av vøruni hjá Seljarinum pr. sesong.

## 3 Broyting av Vøruni

3.1 Vøran skal hvørja sesong vera av sama slagi.

3.2 Um Seljarin avger at broyta vøruna ella skifta undirveitara, skal Seljarin kunna Keyparin um hetta skrivliga í seinasta lagi 1 mánaða áðrenn, at avgerðin verður tikin. Einasta heimild Keyparin hevur í sambandi við avgerðina hjá seljara: (i) at siga Avtaluna upp við 1 mðr. Freist, uttan ábyrgd yvir fyri Seljara, ella (ii) at senda eina bílegging upp á seinastu veiting av vøruni.

## 4 Innkeyp

4.1 Keyp av Vøruni verður framt við, at Keyparin sjálvur heintar Vøruna hjá Seljaranum.

## 5 Vøran og veitingin

5.1 Vatninnihaldið í Vøruni skal ikki verða yvir 4% í havsalti og 1% í steinsalti.

5.2 Seljarin skal hava í minsta lagi 2000 tons á goymslu á meginøkinum í Føroyum í byrjanini av vetrasesongini.

5.3 Ein partveiting á 500 tons skal kunna heintast av Keypara innan 5 arbeiðsdagar.

5.4 Vøran skal goymast so turt sum tað er møguligt og minst møguliga undir hálvtekju.

5.5 Keyparin skal heinta Vøruna sjálvur. Bilførarar Keyparans kunnu sjálvir heinta Vøruna uttan fyri vanliga arbeiðstíð eftir avtalu við Seljaran

6 Prísur og gjald

6.1 Prísurin á vøruni er pr. tons. Frároknað mvg ella líknandi avgjøld

Veturin 2016-2017: xxx kr/tons ab goymslu

Veturin 2017-2018: xxx kr/tons ab goymslu

Veturin 2018-2019: xxx kr/tons ab goymslu

6.2 Umvøran verður leverað í 1 tons sekkjum, verður ískoytið kr. xxx fyri sekkin íroknað fylling.

6.3 Seljarin skal senda rokning fyri vøruna til Keyparan við levering. Á rokning skal verða tilskilað:

Øki(hvat øki Keyparans er Vøran Keyparans leverað til)

Kontraktupplýsingar (víst verður til hesa avtaluna)

Keyparin hevur rætt til at vísa burtur rokningar, sum ikki verða sendar sambært oman fyri standandi.

6.4 Seljarin kann ikki indeksjavna prísirnar í petti 6.1 og 6.2.

**7 Broyting av Avtaluni.**

7.1 Ískoyti ella broytingar av Avtaluni herundir broyting av Vøruni kann bara verða gjørd við skrivligari avtalu partanna millum og við eini viðbót. Viðbøtur skulu talmerkjast framhaldandi, undirskrivast av báðum pørtum og viðleggjast hesi Avtalu.

**8 Avhending av rættindum**

8.1 Keyparin hevur rætt til at avhenda síni rættindi og skyldur sambært hesi Avtalu til ein annan almennan stovn, tá ið tær uppgávur, sum Keyparin hevur tikið sær av verða fluttar til hendan stovnin. Seljarin kann ikki, uttan við skrivligum samtykki Keyparans avhenda síni rættindi og skyldur sambært hesi Avtalu til tiðjamann. Keyparin kann ikki nokkta fyri tílíkum samtykki uttan sakliga orsøk.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

## 9 Trúnaður

9.1 Ein partur skal halda allar upplýsingar, sum fáast til vega frá hinum partinum í sambandi við útinning av Avtaluni, í fullum trúnaði og má ikki lata triðjaparti teir ella brúka teir til annað endamál enn at útinna Avtaluna, uttan at hava fingið skrivligt samtykki frá hinum partinum.´

9.2 Skyldurnar í petti 9.1 í Avtaluni eru ikki galdandi fyri upplýsingar, sum almenningurin vanliga hevur atgongd til, verða fingnar til vega í góðari trúgv av einum triðjaparti, verður ment sjálvstøðugt av einum parti uttan brúk av upplýsingum frá hinum partinum ella verður latið uppfylling av lógligum skyldum.

9.3 Seljarin kann ikki brúka Keyparin í síni marknaðarføring, herundir heimasíðu, tilvísingum o.a. uttan við skrivligum loyvi frá Keyparanum.

## 10 Ábyrgdaravmarking

10.1 Ein partur skal ikki hava ábyrgd av vantandi uppfylling av eini treyt í Avtaluni, sum skyldast hendingar, sum liggja uttan fyri vanligt eftirlit (force majeure). Um ein tílík hending heldur fram í 30 dagar ella meir, hevur tann parturin, sum ikki er ávirkaður av hesi hending, rætt til at siga upp Avtaluna skrivliga til og uttan ábyrgd yvir fyri tí parti, sum er ávirkaður av hendingini.

## 11 Gildistíð

11.1 Avtalan kemur í gildi, tá ið hon er undirskrivaðav báðum pørtum, og stendur við í 3 ár ella til hon fer úr gildi sambært Avtaluni petti 11.2, ella 11.3.

11.2 Báðir partar kunnu til einhvørja tí uppsiga Avtaluna við hin partin óansæð orsøk við 6 mánaða skrivligari ávaring

11.3 Báðir partar kunnu uppsiga Avtaluna við hin partin skrivliga her og nú, um hin parturin letur verða við at rætta eitt munandi mishal av Avtaluni í seinasta lagi 15 dagar eftir at hava fingið boð um mishaldið.

12 Aðrar treytir

12.1 Henda Avtala fevnir um alt avtalugrundarlagið millum partanar viðvíkjandi keypi og sølu av Vøruni. Avtalan kann bara broytast við einari skrivligari avtalu, sum verður undirskrivað av báðum pørtunum (Sí petti 7.1).

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

12.2  Møguligar ósemjur millum partanar, sum kunnu vera í sambandi við Avtaluna, og sum ikki kunnu avgerast í sátt og semju, verða lagdar fyri Føroya Rætt at avgera.

12.3  Ásetingar sambært Avtaluni petti 9, 12.2 og 12.3 verða verandi í gildi, eftir at avtalan er farin úr gildi óansæð orsøk.

| | |
|---|---|
| Fyri Seljara | Fyri Keypara |
| Navn: | Navn: |
| Heiti: | Heiti: |
| Dagur: | Dagur |

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo